## Viðmerking:

# RIDDARASLAGIÐ til Jóannesar Eidesgaards áðrenn landsfund Javnadarfloksins

Hesar seinastu mánarnar og serliga henda mánadin hevur Jóannes Eidesgaard verið svínaður út og dúgliga álopin av diversum fullveldisfólki, (líka frá Vágfjalli til Úlvsá og Elin Henriksen) og tadð hava nógvir eldri javnaðarveljarar fegnast um, tí einki er meira skammiligt hjá javnaðarfólki enn at verða róstur av tí slagnum.

Petur Mohr Dam, slóðbrótari okkara, sum var arkitekturin aftan fyri føroyska vælferdarstatin plagdi ofta at taka til, at besta kumpassið hjá honum fyri at vita, um politiska kósin var røtt, rættvís og greið fyri at gagna føroysku lønarfjøldini var at síggja og hoyra, hvussu nógv hann var hunddálkadur av tjóðveldismonnum. (Hann hevdi tann heiður saman vid Georg Lindenskov Samuelsen at vera mest persónliga chikaneraði føroyski politikkari – fyrst av fólkaflokki, sídani av tjódðveldismonnum.) Skuldi tað knappliga verið ein vika, har hann ikki var yvirfúsaður av teimum, gjørdist hann næstan illa við og fór at umhugsa, um hann mundi vera á rættari leið politiskt, “tí … “, legði hann afturat, “ Gud náði og troysti okkum javnaðarmenn, taíð vit í okkara rættvísispolitikki rokna við at fáa nakra tøkk frá tí turrgelda tjóðveldislidinum, sum aldri hevur havt og aldri fer at hava nakran erligan socialan vilja í politikki.” Ì dag verda linjurnar tíbetri strikaðar týðuliga upp í føroyskum politikki, soleiðis at eingin ivi skal vera um tað bládýpi, sum er og altíð fer at vera millum øðrumegin rationelt og pragmatiskt hugsandi javnaðarmenn og hinumegin ábyrgdarleysar, irrationellar nationalistar og dagdroymarar sum fullveldismenn. Her er munur á monnum. Risagjógv er millum skilaleiðina hjá Jóannesi og ørvitisleiðina hjá Høgna.

Frá tí vulgeru reklamustovuni i Tinganesi (fyrr landsstýrisskrivstovan) roynir Landsmøsnarin, Hoydal at villleiða fólk og fortelja teimum, at vit eru ein homogen tjóð, og tí er ikki brúk fyri flokspolitikki longur. Hetta sigur óvitin í ramasta álvara. Bara tað sigur okkum, at tað er brúk fyri javnaðarpolitikki meira enn nakrantíð áður. Er hann so ungur, at hann ikki veit, hvørjar hann her citerar? Hevur hann aldri hoyrt um korporativan politikk ella Volksgemeinschaft? Hevur hann ikki, kunnu vit vissa hann um, at tað ongantíð hevur verið meira brúk fyri flokkspolitikki, enn síðani hann kom við sínum ørvitisprojekti um loysing uppá avbetaling.



Hann skal eisini gera sær greitt, at føroyingar aldri vera nakað homogent fólk, - hartil eru ahugamálini ov ymisk. Tad er langt glopp frá teim, sum halda seg hava patent uppá at vera føroyingur og so til teirra, sum veruliga eru tað og búleikast á bygd fyri slitmannaløn. Tann forkelaða klikan av vælløntum, dansktgøddum akademiskum patentføroyingum, sum dusa sær í Havn hava eingi áhugamál til felags við arbeidsmonnum í Miðvági, arbeidskvinnum í Sumba, útróðrarmonnum í Klakksvík ella fiskimonnum í Fuglafirði. Her mugu javnadarmenn kompromisleyst avdúka og steðga demagoginum, og tað tykist Jóannes at vera farin undir nú av álvara, tí leika fullveldismenn steinørir. Vit onnur fegnast og veita honum riddaraslag. Riddarin skal herja móti øllum drekum og trøllum, ikki minst fullveldisskrýmslinum. Ì politikki hava tjóðveldismenn altid verið ørindaleysir - fantasileysir nationalistar, sum ongantíð lærdu at hugsa longur og meira enn eina hálva viku fram í tíðina.

Teir eru ikki problemloysandi – nationalistar eru allastadni bara problemskapandi.

Lat tað vera sagt, so tað ikki kann misskiljast, at javnaðarmenn aldri hava verið og aldri verða fullveldismenn, hvaðna minni loysingarmenn, tað skal tí endurtakast, at tí og júst tí er meira brúk fyri sterkum miðvísum flokkspolitikki, sum kann avdúka tómleikan og vitloysi í fullveldisprojektinum og Hoydalsrepublikkini. Hetta er Jóannes eisini farin undir, tí verður hann ærumeiddur av tí hatsku fullveldis-juntaini.

Tað er tí í góðum treysti, at javnadarfólk hesu ferð kunnu fara til landsfundar og vita tað, at flokkurin enn sum fyrr vil stríðast móti allari nationalismu, danahatri, ósemju og øllum tí destruktiva og niðurbrótandi politikki, sum tjóðveldisflokkurin altíð hevur umboðað. Yvirlýsing átti at verið gjørd um, at fólkið ikki longur vil finna seg í tí landsfíggjada heilavaski, sum Hoydalsmøsnarin skippar fyri hvønn einasta dag, har hann beinleiðis neyðtekur alla tíðindatænastu her í landinum. Ì øllum øðrum londum hevdði tað, sum fyriferst í Tinganesi verið mett undantaksstøða, har vanlig demokratisk rættindi eru suspenderad! Men hjá okkum ber alt til!

**Tvinnar eru leiðirnar:**
Tann hjá Høgna er við bindi fyri eyguni at leypa beint á sjógv – hin leiðin, tann hjá Jóannesi er ein hampuliga vælgongd gøta, har vit taka brekkuna lagaliga, sýn av sýn, hamara fyri hamara, og vita við okkum sjálvum, at fram kemur hann, ið hóliga fer. Hesa seinnu leiðina fær Jóannes ótøkk fyri frá fullveldismonnum, tí teir vilja hvørki dønum ella vanliga føroyinginum nakað gott. Vit kunnu bara biðja hann dríva meira á, so hann eins og Petur Mohr Dam fær allan tjóðveldiskøstin oman yvir seg, men harvið kann koma heilt fram á odda í rættvísisstríðnum. Men júst tí, at Jóannes verður lastaður av hasum fólkaslagnum, skal hann hava og hevur uppiborið riddaraslag frá okkum øðrum, ið vilja samstarv, symbiosu og gott brøðralag við danir.

Støðan er sera álvarsom í dag! Fullveldisklikan søkir við vilja konfrontatión við danir og roynir at forpesta viðurskiftini millum báðar tjóðirnar. Landsmøsnarin er langt síðani farin um alt mark fyri demokratiskan atburð. Alt tað, sum heimastýrisflokkarnir høvdu bygd upp av vælvild og áliti millum danir og okkum við seigum dugnaarbeiði líka síðani 1946 er henda kyniska ókvalifiseraða novisa í politikki við at beina fyri. Verður hesin politiski óviti ikki steðgaður skjótt, kann tað koma at taka eitt heilt ættarlið at byggja uppaftur normalar relatiónir við danir.

Landsfundur Javnaðarfloksins eigur tí at taka hetta álvarsmál upp soleiðis at danir skilja at tað bara er ein forkelaður fullveldisbólkur, sum stendur aftan fyri hesar ráu og ábyrgdarleysu kollisiónskósina.

Lat okkum at enda øll minnast, hvussu Petur Mohr Dam plagdi at teppa Erlend Patursson og hansara herviliga harkalið, táið teir fóru sjóleysir upp at rópa um, at “í Føroyum skuldu føroyingar ráða” … so kom tað sáttliga, men hvast frá Petur Mohr Dam: Í Føroyum skulu føroyingar liva. Vit vita, at í tí fongsli, sum fullveldismenn kunnu bjóða okkum, verður ikki liviligt hjá rættiliga nógvum. Svangligt verður at liva av ússaligari Hoydalshjálp, tí teir menninir egna bara fyri seg sjálvan, og sera ódrúgvur verður posamatur frá ódugnaligum tjóðveldismonnum. Og tí, at Jóannes er farin at stríðast manniliga móti hesum samvitskuleysu hyklarum, skal hann hava sítt triðja riddaraslag. Einki er meira heiðurligt og riddarligt fyri ein føroyskan politikkara enn at herja móti Hoydalismuni, heimføðisskapinum og fordummilsinum, tí annað er turrgeldi Hoydalsóvitin ikki førur fyri at veita tjóðini og hansara fjarstýrdu mikrofonhaldarar í tjóðveldisreiðrunum í útvarpi , sjónvarpi og aðrastaðni við standa bara sum observatørar og tora ikki at muta ímóti. Jóannes er tí rættiliga einsamallur í dag – hóast hann er andstøðuleiðari, verður hann at kalla ikki boðsendur av fjølmiðlum. Vit eiga øll at stuðla Jóannesi og ikki lata hann stríðast einsamallan! Frá okkara journalistum er eingin hjálp at heimta – teir hava selt seg langtsíðani!

**Virgar T. Dalsgaard**



### Til minnis um
## Elinborg Zachariasen

Nú er eitt ár liðið. Boðini komu óvæntað, at Elinborg knappliga var farin á Sjúkrahúsið. Vit vónaðu, at tað fór at laga seg. Men ta náttina á Landssjúkrahúsinum fingu vit at vita, sum tímarnir liðu, at onki var at gera.

Soleiðis kann lagnan sláa. Yngst av seks systkjum skuldi fara fyrst. Røsk og glað og altíð til reiðar at geva eina hjálpandi hond. Tað var so meiningsleyst at Elinborg brádliga ikki var her meira.

Hon var so heppin at traðka sínar barnaskógvar á Borðuni. Røturnar vóru av Nesi og úr Lamba. Grundarlagið var gott at skapa tað menniskjað, hon var. So lítillátin, og hevði tó so stóran týdning fyri okkum. Øllum tørvar eitt grundarlag, og hon var ein, ið dugdi at savna familjuna, altíð við frískum sinni og hugskotum. Hugsaði positivt. Var millum annað við til at lata Konditaríið uppaftur.

Ringt er at skilja, at hon ikki er her longur. Men minnini liva.

Latið okkum minnast tað góða, Elinborg gav okkum, og latið hennara lyndi geva okkum íblástur. Eingin veit, hvat ið kemur, so vit mugu gleðast um tað, vit hava.

Ærað veri minnið um Elinborg.

**Páll og Súni**



**Ítróttur**

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Ion fær fýra ár afturat

*Seinnapartin í gjár skrivaði Ion Geolgau undir nýggjan sáttmála við HB. Sáttmálin er galdandi í 4 ár*

JÁKUP MØRK

At ein somikið langur sáttmáli verður undirskrivaður, er nærum óhoyrt í føroyskum fótbólti.

Við undantakið av mest vinnandi føroyska venjaranum, Johan Nielsen, hevur tað so als ikki verið gerandiskostur, at venjarar støðast leingi í einum og sama felag.

**Fleiri orsøkir**
Sambært stjóranum í P/F Havnar Fótbóltur, sum er partafelagið aftan fyri fremsta liðið hjá HB, so eru tað tó fleiri orsøkir til, at felagið nú ger ein somikið langan sáttmála við Ion.

- Tað eru so nógvir smærri og størri lutir, sum hava verið viðvirkandi, sigur Steinfinnur Mittelstein.

- Fyrst og fremst er sjálvandi at siga, at vit hava verið sera væl nøgdir við tað arbeiði, sum Ion hevur gjørt fyri okkum higartil. Hóast talan ikki hevur verið um gullmerki hvør ár, so eru vit so avgjørt ikki av teirri fatan, at venjarin ber skuldina fyri hetta.

- Tað er eisini okkara fatan, at spælararnir hava verið væl nøgdir, og vit hava spurt okkum fyri hjá bæði dreingja-, unglinga- og fyrstudeildarliðnum, áðrenn nøkur avgerð varð tikin í so máta.

Eisini leggur Steinfinn dent á, at tað so avgjørt ikki er nøkur løtt uppgáva at finna ein nýggjan venjara, og tá samstarviði hevur koyrt somikið væl í trý ár, heldur hann tað vera upplagt at leingja sáttmálan.

- Skal ein nýggjur venjari finnast, skal nógv arbeiði leggjast í, áðrenn partarnir kenna hvønn annan nóg væl. Hetta hava vit verið ígjøgnum við Ion. Í byrjanini var tað sjálvandi ein stór umstilling, sum mátti fara fram hjá báðum pørtum, tí hann kom jú úr einum heilt øðrum umhvørvi, har krøv til og umstøður hjá leikarunum eru heilt øðrvísi enn hjá okkum. Nú dugir hann at laga seg til føroysku mentanina, meðan vit samstundis síggja nógv positivt í hansara hugburði, har tilvildin so at siga ongantíð sleppur at ráða.

- Eisini hevur hann stórar menniskjaligar eginleikar, sum vit hesi trý árini hava virðismett sera høgt, so samanumtikið hava vit verið sera fegin um hansara leiklut í felagnum.



*Í HB eru tey somikið fegin um venjaran, at Ion nú fær fýra ár afturat í felagnum. Sáttmálin skuldi eftir ætlan undirskrivast seinnapartin í gjár*

## Viðmerking

Í viðmerking frá aðalskrivaranum frá Fótbóltssambandi Føroya í Sosialinum týsdagin, komu einstøk viðurskifti fram, sum eftir okkara tykki eiga eina rættleiðing uppiborna.

Hendingarnar kunnu samanskrivast nakað soleiðis: Tann 28. juli í ár sendi GÍ inn eina umbøn um, at kunna nýta einstakan leikara, sum er avtaluleikari uttanlanda og er føroyingur. Saman við hesi umbøn fylgdi ein skrivlig váttan - bæði frá leikaranum og frá felagnum, sum viðkomandi er sáttmálabundin við. Hetta var í tráð við tað, sum stendur í ásetingunum hjá FSF §17, stk. 2, og fyrsta afturmeldingin frá FSF var tá eisini, at ásetingarnar vóru fylgdar.

Nakað seinni byrjaði meldingarnar frá FSF at broytast nakað, og fyri umleið tveimum vikum síðani fekk GÍ eitt bræv frá FSF, har tað bleiv staðfest, at vit bert kundu fáa loyvi at gera nýtslu av viðkomandi leikara, um leikloyvið varð flutt umleið tvær vikur eftir 28. juli! Leggið merki til, at fingu brævið fyrst í september – tvs. umleið góðan mánað eftir 28. juli. Tá var heldur torført at halda ásetingina um tvær vikur, sum annars ikki er niðurfeld nakra staðni.

Tað er eisini rætt, at vit, eftir at hava fingið brævið frá FSF, høvdu møguleika at kæra avgerðina til Dómsnevndina, men meldingarnar frá aðalskrivaranum hjá FSF hava verið, at juridiska ekspertisan í dómsnevndini, sum samstundis er juridiska ekspertisan hjá FSF, hava luttikið í niðurstøðum FSF's, so ilt er at ímynda sær nakra aðra niðurstøðu enn hana, sum FSF og aðalskrivarin eru komin til.

Vit vilja tí fegin átala, at FSF tekur avgerðir, sum ikki beinleiðis standa í lógum felagsins – t.v.s. lógum, sum øll feløginin dagliga kunnu halda seg til. At FSF ger niðurstøður, sum vit ongan møguleika hava at fylgja – t.v.s. at ynski um at eitt leikloyvi skal flytast fleiri vikur undan, at vit hava fingið kunnleika um hetta. Og at enda at juridiska ekspertisan hjá FSF samstundis er dómsnevnd felagsins.

við ítróttakvøðu

Gøtu Ítróttarfelag
Nevndin

# Runt Agnið 2000

*Árliga rennikappingin, Runt Agnið, fór fram í Eysturoynni um vikuskiftið*




*Rigmor N. Joensen og Guttorm Sørensen eru trygt á odda í Daewoo Marathon kappingini*

***Mynd: Birgir Sondum***

Líkindini at renna vóru ikki av teimum bestu, tá Roysnið seinasta leygardag skipaði fyri árligu rennikappingini Runt Agnið. Teir 18 rennarar løgdu til brots í regni og vindi. Men hetta veðurlagið er vorðin ein náttúrligur partur av kappingini Runt Agnið.

Byrjað varð við skúlan á Toftum. Runnið varð úteftir gjøgnum Tofta bygd, niðan Heygarnar, út á Nes og niðan á Agnið. Runnið varð so oman móti Runavíkini, út gjøgnum Saltnes og á mál á Tofta kei.

Hjá monnunum løgdu Sølvi R. Hansen og Guttorm Sørensen harðast út, meðan Cecil Weihe legði seg á triðja plássið. Guttorm og Sølvi fylgdust, til okkurt um 1 km var eftir, tá fór Guttorm frá Sølva og gjørdist sostatt vinnari av kappingini. Sølvi gjørdist nr. tvey, meðan Cecil gjørdist nr. trý.

**Rigmor for solo**
Hjá kvinnunum vóru einans tríggir luttakarar. Rigmor N. Joensen legði seg á odda beinanvegin og helt leiðsluna heilt á mál. Nummar tvey og trý gjørdust ávikavist Brindis Weihe og Inga Hansen.

**Guttorm og Rigmor á odda**
Kappingin var samstundis triðja og næstseinasta umfar av Daewoo Marathon Cup, har luttakarnir í fýra umførum tilsamans
renna eitt heilt marathon.

Hjá kvinnum er Rigmor N. Joensen trygt á odda frammanfyri Brindis Weihe. Í teimum fyrstu trimum kappingunum, ið eru tilsamans 36,595 km til longdar, hava tær nýtt ávikavist 2.28,05 tímar og 3.27,52 tímar.

Undan kappingini leygardagin var størri spenningur hjá monnum. Guttorm Sørensen var bert 9 sek. frammanfyri Signar Røsvik samanlagt. Signar luttók ikki í kappingini Runt Agnið, so nú er Guttorm trygt á odda við tíðini 2.10,35 tímar fyri 36,595 km., meðan Cecil Weihe er nummar tvey við tíðini 2.18,30 tímar. Honum á baki kemur Sølvi R. Hansen, ið hevur nýtt 2.20,11 tímar at renna teir 36,595 kilometrarnar.

Seinasta umfar av Daewoo Marathon Cup verður tann 21. oktober, tá 5,6 km verða runnir í Kambsdali.

**Úrslit, Runt Agnið**
**Kvinnur**
1. Rigmor N. Joensen, Bragdið, 42,55 min
2. Brindis Weihe, Bragdið, 57,08 min

**Menn**
1. Guttorm Sørensen, Treysti, 37,36 min
2. Sølvi R. Hansen, Roysnið, 37,53 min
3. Cecil Weihe, Bragdið, 39,05 min